

# Stór hús í Hoyvík til sølu

Við hesum verður sethúsaognin Hvítanesvegur 43, 188 Hoyvík (matr.nr. 1dd) lýst til sølu. Sethúsini eru frá 1980 og í góðum standi. Sethúsini eru í tveimum hæddum á uml. 220 m², umframt bilhús á uml. 40 m². Grundøkið er 670 m² til støddar. Fleiri myndir og upplýsingar eru á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo.
Áhugað kunnu venda sær til Sarah Ann B. Thomsen, sat@lawfirm.fo ella Annu Dam.

Sosialurin 341800

**ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4**

YVIRI VIÐ STROND 4
100 TÓRSHAVN
TLF. 203040, FAX. 203041
E-MAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

Javni – Virkin og virðismikil

# Aðalfundur hjá Javna

verður á Hotel Hafnia Parnassinum
leygardagin 30. apríl kl. 13

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

Punkt 6. Starvsnevndarval: 2 starvsnevndarlimir og 1 varalimur standa fyri vali og ynskja ikki at stilla upp aftur. Smb. Grein 6 stk. 4 skulu uppskot vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1 viku undan aðalfundinum.

Punkt 9. Innkomin mál til viðgerðar ella avgerðar: Starvsnevndin søkir smb. grein 8 stk. 6 aðalfundin um heimild til at upptaka lán á upp til 1. mill. og veðseta fastogn í tí sambandi. Lánið skal nýtast til grundøki til nýtt umlættingarheim í Tórshavn.

**Skrá fyri dagin:**

kl. 10.30 Vælkomin - Smoothie
kl. 10.45 Fyrilesturin ÚT við strongd við Niclas Hera Jákupssyni
kl. 12.00 Døgurði í matstovuni
kl. 13.00 Aðalfundur
kl. 15.00 Kaffi / te
kl. 15.15 Fyrilesturin INN við lívsgleði við Niclas Hera Jákupssyni

**Javni**
Hoydalsvegur 40
110 Tórshavn
tlf. 314827 / 514827 / 594827
teldupost: javni@javni.fo · skriv@javni.fo
www.javni.fo

Fuglafjarðar Kommuna

# Námsfrøðingur til dagstovnin í Fuglafirði

Søkt verður eftir einum námsfrøðingum, at arbeiða 30 tíma viku í barnagarðsstovu í dagstovninum í Fuglafirði, at byrja 26.04.2011 ella eftir nærri avtalu.

Dagstovnurin er skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Frá 01.08.2006 er dagstovnurin ætlaður 76 børnum við tað at stovnurin varð víðkaður við eini barnagarðsstovu.

**Vit sóknast eftir námsfrøðingi:**

- ið kann arbeiða sjálvstøðugt, og er førir fyri at orða seg skrivliga
- hevur arbeiðsroyndir, sum kunnu nýtast í dagliga arbeiðinum
- hevur umsorgan fyri børnunum
- eru eldhugaður og jaligur
- hevur góð samstarvsevnir
- sær møguleikar fram um mørk
- ein fyrimunur er, um tú dugir at spæla instrumentið

**Vit kunnu bjóða tær:**

- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur
- eitt starv, har tú kanst brúka tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan
- samstarv við sernám (náms- og sálarfrøðilig ráðgeving), sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu

**Setanartreytir:**
Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Nærri fæst at vita** um starvi við at venda sær til leiðaran í dagstovninum:
Marius Joensen, á tlf. 238030.

**Umsóknir** saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða sendar til:
Býráðsskrivstovuna, Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður í seinasta lagi 20.04.2011.

**Fuglafjarðar kommuna**




RUNAVÍKAR KOMMUNA

# søkir eftir sosialráðgeva til Eysturoyar barnaverndartænastu

Eitt farloyvisstarv 40 t./v. sum sosialráðgevi í Eysturoyar barnaverndartænastu er leyst at søkja til setan frá 01.05.2011 til 31.03.2012.

**Um Eysturoyar barnaverndartænastu**
Eysturoyar barnaverndartænasta fevnir um Nes, Sjóvar og Runavíkar kommunu. Uppgávan hjá barnaverndartænastuni er at tryggja børnum, ið liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðuga hjálp og umsorgan.
Umsitingarliga er Eysturoyar Barnaverndartænasta ein eind undir Sosialu deild í Runavíkar kommunu.

**Starvið**
Tú kemur, í tøttum samstarvi við sosialdeildarleiðaran og sosialráðgevan í tænastuni, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við málsviðgerð, ráðgeving og øðrum uppgávum, sum Barnaverndartænastan tekur sær av.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.:**

- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverndini í barnaverndarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakligt
- at arbeiða fyribyrgjandi í samstarvi við fakpersónar og stovnar á barna- og ungdómsøkinum

**Vit leita eftir starvsfelaga, ið:**

- er útbúgvin sosialráðgevi ella hevur aðra viðkomandi miðallanga útbúgving
- hevur royndir sum málsviðgeri ella aðrar viðkomandi royndir
- hevur áhuga og evnir at arbeiða við barna og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógvar bóltar í luftini
- hevur gott yvirlit og dugir væl at orða seg
- hevur góðan telduførleika

**Vit bjóða tær**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum og góðum møgulleikum fyri førleikamenning.

**Setanarviðurskifti**
Starvið, sum er fulltíðarstarv, verður sett sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið ella annað viðkomandi fakfelag.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á telefon 417000.

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagi fríggjadagin 22.04.2011

**Umsóknin skal sendst til:**
Runavíkar kommunu
Att. Eysturoyar barnaverndartænasta
Heiðavegur 26
Postboks 139
FO-600 Saltangará

**Runavíkar kommuna**
Heiðavegur 26 · Postsmoga 139 · FO-600 Saltangar